

*- Tað hendi ikki nógv eftir tað, men tað var hóast alt altíð okkurt at takast við. Tað var smátt. Ein royndi at lívbjarga sær, hóast ár vóru ímillum stóru uppgávurnar, sigur Janus Kamban um tíðina eftir, at hann var komin heim úr Danmark, har hann hevði tikið listarliga útbúgving*

# Seinasti slóðarin

## Lív oglist



**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

Tygara útsendi leitaði sær ein dag mitt í august yvir í Klokkaragøtu í Havn. Har býr Janus Kamban í listaskemmu síni.

Blíður tekur hann ímóti hesum eitt sindur seinkaða blaðmanninum. Janus verður 94 ár í september, og ellið er farið at boyggja myndahøggaran. Men mótvegis egnum útsøgnum um, at hann er hálvavegna í ørviti, so tykist vitið hvast, og eyguni spæla livandi, tá gesturin verður boðin niðan í stovuna. Húsini eru líkasum uppbygd í hæddum. Sjálv listaskemman, verkstaðurin, eigur stóran part av húsarúmdini.

Vit sessast í stovuni til eitt prát um lív og list, meðan Janus Kamban setir klokkuna á borðið frammanfyri sær; hann hevur nevniliga sett sær døgurða í ovnin.

### Gávur

Men hvat var tað, ið vakti so brennandi áhuga fyri listini.

- Eg fekst við at tekna og slíkt. Har vóru fólk, ið eggjaðu til, t.d. Richard Long og aðrir lærarar. Teir hildu óivað, at drongurin hevði gávur, smálær Janus Kamban.

- Í konfirmatiónsgávu fekk eg listasøguna hjá Laurin. Richard Long fylgdi við á mentanarøkinum, sigur Janus Kamban og fer yvir at bókahillini og kemur aftur við gomlu bókini.

At velja sær list sum lívsstarv og livibreyð í 1930'unum, var ikki hvørsmans val. Hvussu mundu fólk hugsa um slíkt?

- Ein hin fyrsta listaframsýningin var í Avhaldinum, har Heinesen, Zhale og Mikines sýndu fram, vísir Janus á.

- Eg haldi ikki, at eg merkti nakra beinleiðis reaktión frá nøkrum viðvíkjandi lesnaðinum á Akademinum, sigur Janus og minnir lítillátin á, at innan gingu nakrir føroyingar á Akademinum, t.d. Mikines, og at tann fyrsta var Birgitta Johannesen, ið var dóttir Niels Johannesen.

- Hon var gift og búði í Danmark, men vitjaði hvørt summar í Føroyum. Hon tók lut á ólavsøkuframsýningunum. Fleiri av vatnlitsmyndum hennara eru á Listasavninum, sigur Janus Kamban.

- Mikines var kanska hin fyrsti, ið gjørdi um seg, um eg so má siga, sigur Janus Kamban, sum ongantíð minnist seg hava fingið nakra viðmerking um valið av útbúgving, og tí metir hann, at hetta var gótikið millum manna.

- Eg vaks upp í Havn, so kanska var tað eitt sindur øðrvísi, enn um tað hevði verið á bygd, Eg veit ikki. Hinvegin var Mikines av bygd, men her var eitt listaumhvørvi, ið t.d. t.d Heinesen og Zhale settu dám á, sigur Janus Kamban hugsunnarsamur.

Mamma Janus Kamban var úr Havn, meðan pápin, ið var lærari, var ættaður úr Skúvoy.

Sosialurin